## Heidningar hittast

Fríggjadagin byrjar fyrsta altjóða summarlegan hjá teimum, sum trúgva upp á norðurlendsku gudarnar. Legan verður í Ebeltoft í Danmark og varir eina viku. Danska felagið, sum er einasta asatrúarsamfelag í landinum, nevnist Forn Sidr og hevur 650 limir. Bara ein lítil partur av limunum í hesum felag ætla sær við eftir eitt orðaskifti um rasismu. Asatrúgvandi úr 10 londum fara at luttaka, og av teimum 150, sum hava teknað seg, eru bara 31 danir.



## Eldra-tsunami á veg

Amerikanskir granskarar meta, at innan ár 2040 verður talið av fólki yvir 65 ár tvífalt í mun til í dag.
Í dag eru áleið 500 milliónir fólk í aldurbólkinum omanfyri 65 ár. Hesi koma um 30 ár upp á 1,3 milliardir fólk. Hetta verður fyrstu ferð søgu menniskjans, at fleiri fólk verða omanfyri 65 ár í mun til børn undir fimm ár. Hetta fer sjálvsagt at kosta. Bæði innan heilsuverkið og tjóðarbúskapunum. Sostatt minkar vøksturin í ES við einari helvt í 2030 í mun til í dag, verður politikkurin í samveldinum ikki lagaður til broyttu umstøðurnar. (NTB-AP-Reuters)

# 2 milliardir kunnu nú læra seg føroyskt



*Nýggja skeiðið í føroyskum er sett saman av mállærubók og lesibók við tilhoyrandi ljóðfløgu, sum nú er tøk á netinum*

**Nýtt læruverk í føroyskum miðar eftir ikki færri enn tveimum milliardum brúkarum kring allan knøttin. Útgávan er nevniliga ætlað øllum, sum duga enskt og finst longu nú lutvíst á netinum**

MÁL
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*



*Zakarias Wang, ritstjóri, við fyrstu útgávuni av "Faroese – A Language Course for Beginners"*

Herfyri gav forlagið Stiðin út verkið *Faroese – A Language Course for Beginners,* sum bjóðar ein heilt nýggjan møguleika at læra seg føroyskt umvegis enskt. Verkið, ið er samansett av mállæru, lesibók og fløgu, hóskar bæði til sjálvsnám og undirvísing og kann sostatt nýtast av øllum sum duga enskt, uttan mun til, hvar tey eru stødd á knøttinum.

Eisini føroyska úttalan kann nú lærast, hóast brúkarin ikki er staddur í Føroyum, tí longu nú ber til at taka ljóðfløguna niður av heimasíðuni hjá forlagnum á www.stidin.fo

### Sermerkt samstarv

*Faroese – A Language Course for Beginners,* sum nu loysir tað gamla læruverkið í føroyskum hjá Lockwood av, er tíðarbært, gjølla gjøgnumarbeitt og hevur verið í gerð í fleiri ár. Høvundarnir eru tveir doktarar í málfrøði: Hjalmar P. Petersen, sum arbeiðir á universiteti í Hamburg og er doktari haðani, og Jonathan Adams, doktari úr Hull.

Jonathan Adams, ið býr og starvast í Danmark á vísindaforlagnum Dansk Sprog- og Litteraturselskab, var kønur í donskum og svenskum, tá ið hann í 2004 kom til Føroya á fyrsta altjóða summarskeiðið í føroyskum fyri útlendingar á Fróðskaparsetrinum. Hjalmar P. Petersen var lærari á skeiðinum og ein av høvundunum at *Faroese, An Overview and Reference Grammar* (2004), sum varð brúkt at undirvísa í. Tað var tó greitt, at tørvur var á undirvísingartilfari, ið var skipað sum læruverk við venjingum og møguleika fyri at lurta eftir málinum.





*Tað var á einum skeiði í føroyskum, at teir báðir doktorarnir í málfrøði, Jonathan Adams og Hjalmar P. Petersen hittust og fingu hugskotið til læruverkið "Faroese – A Language Course for Beginners"*

Nakað seinni fóru Jonathan og Hjalmar í holt við at gera mállæru og málvenjingar í føroyskum fyri útlendingar við frágreiðandi teksti á enskum.

Í 2007 varð ljóstak av handritinum við tilfarinum nýtt á altjóða summarskeiðinum, og í 2008 nýtti norðurlendska summarskeiðið á Fróðskaparsetrinum eitt royndarprent.

Meðan tilfarið varð royndarnýtt, varð tað alla tíðina rættað og bøtt varð um tað. Enn var tó eingin fløga gjørd, og saknur var í henni.

Nú eru mállæran og lesibókin við fløgu so útkomnar sum ein heild. Á fløguni eru samrøðurnar í lesibókini lisnar upp, so tað ber til at hoyra málið og samstundis fylgja við í bókini.

### Framúr gott ummæli

Hóast stutt tíð er liðin, síðani nýggjalæruverkið í føroyskum kom út, ger ein av enskmæltu brúkararnum longu nú vart við seg. Tað er kendi ferðahøvundurin, James Proctor, ið skrivar ensku ferðavegleiðingin til Føroyar, "The Bradt Guide to the Faroe Islands", ið gevur *Faroese – A Language Course for Beginners* framúr gott ummæli.

Hann skrivar millum annað soleiðis:

"Endiliga er tað her! Hetta frálíka skeiðið í føroyskum verður heilt vist ein ómetalig hjálp hjá næmingum, sum royna at læra seg tað mest sermerkta av norðurlendsku málunum.

Fløgan sum fylgir við bókunum, ger tað hartil munin lættari hjá næmingum at fáa greiðu á tí ofta lumpisligu føroysku útaluni"

Sambært James Proctor er hetta skeiðið ikki bara tað besta av sínum slag á marknaðinum, við tað at tað bæði er lætt at seta seg inn í og nútíðarligt.

"Skeiðið hevur eisni góðskustemplið hjá høvundunum, Jonathan Adams og Hjalmar P. Petersen. Jonathan, sum er serfrøðingur í norðurlendskum máli og Hjalmar, sum sum hevur føroyskt sum móðurmál og eisini er lærari í føroyskum, hava savnað sínar dyggu førleikar til at skapa hettar í allar mátar umfatandi skeiðið.

Sum høvundi at einastu enskmæltu ferðavegleiðingini til Føroyar: "The Bradt Guide to the Faroe Islands" og sum ein, ið leingi hevur stríðst við at læra seg føroyskt, er tað mær ein stór gleði at viðmæla hetta skeiðið – tað er snøgt sagt framúrskarandi", skrivar James Proctor.